## DAGSINS MEINING

# Liggja sjóvarfallið av sær

Í blaðnum í gjár nevndu vit, at nógvir føroyingar hava skapt sær eina trygga og ríka tilveru í fremmandum londum. Í sama blað er sera áhugaverd og hugvekjandi samrøða við tveir ungar og dugnaligar føroyskar vinnulívsmenn, Jákup á Dul Jacobsen og Niels Stórá, ið hava rokkið sera langt uttanlanda. Hesir menn gjørdu sera áhugaverdar og vælgrundaðar atfinningarsamar viðmerkingar til búskaparligu støðu Føroya, til viðurskifti okkara við útheimin og til viðurskiftini í Føroyum sum heild. Serstakliga hefta hesir báðir vinnulívsmenn seg við visión løgmans og landsstýrisins um, at Føroyar skulu vera millum fremstu lond í heiminum ár 2015. Teir gera vart við, at ansa vit ikki eftir og Føroyar liggja sjóvarfallið av sær, so kann 2015 gerast ein marra heldur enn ein ynskistøða.

Hóast vit her á blaðnum kunnu ivast í tí sera liberalistiska grundtónanum í sjónarmiðunum hjá hesum báðum viðmerkjarum, so mugu vit samstundis ásanna, at báðir menn í fleiri støðum hava grein í sínum máli, og at atfinningarnar eru sera væl undirbygdar. Tað er einki at ivast í, at vit eru ikki nóg væl fyrireikað til globaliseringina og altjóðagerðina. Ábyrgdina av hesum hava politisku myndugleikarnir og vinnulívið. Her hendir alt ov lítið, og ein kann spyrja, hvørjum vit bíða eftir. Nú kenna vit av góðum grundum ikki alt grundarlagið undir visión landsstýrisins, men vit mugu bara vóna, at hon hevur nøkur vælgrundað boð uppá, hvussu vit best takla globalisering og altjóðagerð.

Taka vit nakrar av teimum ítøkiligu atfinningunum hjá Jákupi og Nielsi t.d. viðurskifti við ES, dupultskattasáttmálar, útbúgvingarstøðið og spurningin um hagtøl, so kann væl eingin vera ósamdur. Øll vita, at núverandi handilssáttmáli við ES er ótíðarhóskandi. Tað er gjørdar ábøtur á hendan sáttmála, men hesar verða bara ikki settar í verk. Her er onkur, sum svevur í tímanum! Hví hendir einki? Hvør hevur ábyrgdina? Hvat er hetta fyri ein trekleiki? Almenningur og vinnulív hava rætt til at vita, hvør orsøkin er. Tað er eisini, sum er, møguligt at tengja nógv annað enn reint búskaparligt samstarv t.d. útbúgvingar- og granskigarsamstarv uppí handilsavtalu okkara við ES. Men her hendir heldur einki. Tíðin gongur og vit dragna longur og longur afturúr, meðan grannalond okkara, ið væl at merkja eisini eru uttanfyri ES, skúma róman og hava veldugar fyrimunir av alskyns samstarvi við ES. Her er talan um mentan, vísindi, útbúgving og búskaparlig viðurskifti. Snøgt sagt: her er talan um EBS samstarv, sum vit í okkara ótta fyri ES í síni tíð havnaðu. Nú ber ikki til at bíða longur. Her má nakað henda. Vit venda aftur til samrøðuna við Jákup og Niels í einum komandi blað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Harmilig avgerð men ikki óskiljandi

**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingslimur*



Tað kom sera óvart á meg at lesa tíðindini, at forkvinnan í javnstøðunevndini hevði avgjørt at siga seg úr starvi, og at hon longu hevði gjørt tað í mai mánaða.

Tá eg síggi grundgevingarnar, má eg sum kvinna fyrst og fremst skammast yvir, at hon ikki kundi fáa betri stuðul í sínm arbeiði og harumframt eisini sum politikari harmast, at so skuldi ganga.

Samstundis skal eg viðganga, at eg skilji hana væl.

Mark skal vera fyri, undir hvørjum treytum ein vil ella skal brúka sínar arbeiðsorku!

Jan Mortensen, ið er limur í javnstøðunevndini, sigur í síni viðmerking til málið, at javnstøða í Føroyum beru er eitt eiti, og eg eri púra samd við honum í tí.

### Javnstøðulógin

Vit hava eina javnstøðulóg í Føroyum, men tey flestu, sum eru ímóti lógini, og tey eru ikki so fá, hava als ikki lisið hana.

Føroyar vera stýrdar av monnum í dag, og har er ongin javnstøða.. Skal verandi støða broytast, mugu allar góðar kreftir hjálpa til, tí tað er ikki rætta myndin av okkara samfelag annars. Politikararnir seta kósina og raðfesta, og tað vil so eisini siga, at tað er politiska skipanin, sum skal gera sítt til, at mynstrið verður broytt.

Persónliga eri eg ikki samd við teimum sum siga, at vit skulu kynskvotera við lóg, tí tað kann geva fleiri trupulleikar, men vit kunnu gera tað lættari fyri kvinnur at taka lut í politiska arbeiðnum.

Sjálv havi eg verið til fleiri tiltøk at fáa kvinnur meira aktivt við í politiska arbeiðið, men eg skal viðganga, at tað ofta hevur verið strævið. Hví so er, kunnu vit leingi kjakast um, og skjótt kann tað ljóða sum generalisering, tí allar kvinnur eru ikki eins ella hugsa eins, men tað er veruleiki, at kvinnur raðfesta øðrvísi, og eru skjótar at finnast at sær sjálvari (hava sjálvskritikk!) mótvegis flestu monnum, og at tær eru bangnar fyri at gera okkurt býtt ella skeivt, sum onnur kunnu havast at ella kanska flenna at!

Her skuldi verið ríkiligt at trivið í og broytt, sum kundi lætt um í framtíðini, so kynsmynstrið á Føroya løgtingi broyttist, og fleiri kvinnur fingu áhuga fyri politiska arbeiðnum.

### Broyting krevst

Arbeitt verður politiskt fyri at fáa samtyktina hjá Útnorðurráðnum um fleiri kvinnur í poitikki førda út í lívið.

Einastu forðingina kunnu mennirnir á løgtingi gera, og teir telja jú meir enn 90%, ! ringt er at skilja at vit eru í árinum 2005, men eg vóni og vænti, at teir ikki eru so bangnir fyri sínum egna persónliga sessi, at teir atkvøða ímóti eini samtykt, sum longu varð gjørd á tingi í 1999, tá fleiri tilmæli frá Útnorðurráðnum vóru samtykt.

Samstundis sum eg vil takka Anniku fyri hennara arbeiði, og ynskja henni góðan byr við tí, hon nú fer at takast við, skal eg minna á, at vit hava brúk fyri eini virknari javnstøðunevnd í Føroyum, bæði tá tað snýr seg um politikk, á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum annars..

Vit fáa eitt gott grundarlag undir einum demokratiskum og rættvísum samfelag, tá Føroyar verða stýrdar av bæði kvinnum og monnum,

Soleiðis er støðan bara ikki í dag!!

# Júst sum Miðflokkurin boðaði frá

**Jenis av Rana**



Tá núverðandi samgonga tók við fyri hálvum øðrum ári síðani, vórðu almanna- og heilsumál løgd saman í ráð. Staðiliga ráddu vit í Miðflokkinum frá hesum, tí royndir frá farnu árum vístu at hesi øki vóru ov stór hjá einum landsstýrismanni at umsita. Hesar royndir gjørdu, at Miðflokkurin í undanfarnu samgongu fekk undirtøku fyri at seta tveir landsstýrismenn at røkja hesi so týdningarmiklu mál.

Men vit tosaðu fyri deyvum oyrum. Grundgevingar okkara um at hvørt av hesum økjum, sum jú tæna teimum veikastu samfelagsborgarunum, tørva eitt landsstýrisfólk burturav vórðu kveistraðar til viks. Sama varð, tá vit vístu á, at orkan hjá tí eina á báðum hesum økjum fór neyvan at røkka til meira enn at "sløkkja ringastu eldarnar".

Tíðin, samgongan hevur sitið, hevur prógvað at metingar okkara vóru rættar. Óneyðugt er at minna nakran á skilaloysið, sum valdar á økjunum báðumharmaljóð teirra eldru seinastu tíðina og spenta støðan í sjúkrahúsverkinum vátta, at menn áttu at havt lurta eftir ráðum okkara.

Greiðastur er tó landsstýrismaðurin á økinum, sum í viðtalu við Dimmalætting tísdagin leggur kortini á borðið og bart út játtar, at:

*vit arbeiða við fleiri málum, men vit hava sera nógv at gera í almanna- og heilsumálaráðnum*

*... tí er nýtt forfólk ikki valt ( í javnstøðunevndina)...*

*og*

*tað er bara so nógv onnur mál eisini sum hava verið orkukrevjand....*

Og hartil sigur hann seg:

*...ikki kunna vísa á nakað ítøkiligt sum er spurt burturúr meðan hann hevur sitið sum landsstýrismaður við málinum.*

Í hesum føri er skaðin tó ikki stórur- talan er um at velja forkvinnu í javnstøðunevndina. Men boðskapurin er greiður- byrðan er vorðin ov stór, júst sum Miðflokkurin boðaði frá, fór at verða.

At vit vórðu undirmettir í metingum okkara ger einki. At javnstøðunevndin er óvirkin ger enn minni. Men at hendan arrogansan dagliga gongur útyvir veikastu borgarar okkara er einki minni enn ein sorgarsøga.

Vælsignaðir samgongumenn, saðlið um. Viðgangið mistakið og rættið uppaftur alt tað, sum av berum stoltleika er farið fyri skeyti. Kostnaðurin hevur longu verið ov stórur fyri tey, ið minst megna at gjalda.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.